# Skotið í 25 ár



25 ÁR

*Sunda Byrsufelag hevur í ár verið til í fjórðings øld*

**Sundalagið:** Í ár eru liðin 25 ár síðani Sunda Byrsufelag sá dagsins ljós.

Hetta ætlar tey í felagnum ikki at lata fara aftur við borðinum uttan markering.

Í hesum sambandi verður skjótibreytin hjá felagnum opin fyri almenninginum leygardagin 16. apríl, tá øll eru vælkomin at royna seg við nøkrum skotum. Til ber at lána byrsu og patrónir. Felagið bjóðar ein drekkamunn og annað gott, so tað skuldi ligið væl fyri at lært ítróttina at kenna henda dagin.

Sunda Byrsufelag hevur í roynd og veru longu fingið eina føðingardagsgávu, um ein kann siga tað so.

Á býráðsfundi í Sunda kommunu mánakvøldið varð samtykt, at lata felagnum 6.000 krónum í stuðli til tiltøk í sambandi við 25 ára degnum.

snorri@sosialurin.fo



# Sett prís á grundstykkini

## Gongd kemur nú á summarhúsbyggingina á Sandi

Randi Jacobsen

Nýggja byggisamtyktin fyri Sands bygd er nú góðkend av Innlendismálaráðnum, og harvið ber til at fara undir at byggja sethús, ger kampingøki og byggja summarhús.

Á fundinum mánakvøldið samtykti kommunustýrið, at fermetraprísurin fyri grundstykkini til summarhús skal vera 415 krónur fyri fermeturin. Hetta er sama upphædd, sum kommunan rindar fyri at ogna sær jørðina.

Grundstykkini eru millum 250 og 400 fermetrar.



HJARTASKERANDI

*Absalon Matras greiðir frá neyðini í Rumenia. Í morgin fer hann nýggjan túr hagar við hjálp til tey fátæku*

Mynd: sandportal.fo

# Sandingar binda til Rumenia

**HJÁLPARTILTAK** Hesa seinastu árini hava fólk á Sandoynni givið sítt íkast til hjálpararbeiðið sum føroyingar gera í Rumenia.

Snorri Brend

Mánadagin fekk tilhaldið Hugnin á Sandi so vitjan av Absalon Matras og Anskari Hansen, ið eru knýttir at Rumeniahjálpina.

Absalon ger einar 6 túrar árliga við bussi sínum til Rumenia við hjálp av ymiskum slagiðstøddu børnini kostar umleið 100.000 krónur um árið.

Í tilhaldinum hava tey m.a. bundið og gjørt onnur pløgg, sum nú fara til Rumenia við bussinum hjá Absalon.

Tilhaldið Hugnin hevur verið við at stuðla í nøkur ár, veit Sandoyarportalurin at siga.

Absalon Matras nýtti høvið at greiða frá vitjanum sínum, og nevndi, hvussu stór neyðin er í Rumenia, og hvussu stórur tørvur er á hjálp.

Hann segði frá, at mammur fara frá sínum børnum, tí tær hava ikki mat til tey, so tey ganga einsamøll, heilt niður í 4 árs aldur og bidda mat. Absalon segði eisini, at onkur kanska undrar seg yvir, hví hann ikki tekur mat við til tey. Men støð er hon, at hetta hevur hann ikki loyvi til.

Absalon fer avstað á nýggjan túr til Rumenian við Norrønu í morgin.



ÁHUGI

*Lurtað verður við áhuga eftir tí sum Absalon og Anskar greiddu frá*